

Aksel Johannesen, løgmaður og russiski sendiharrin í Íslandi. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Løgmaður væl móttikin av russiska sendiharranum

**Jan Müller**

18.10.2015 - 15:01

Oljan.fo

Jan Müller úr Reykjavík.

Nú høgtstandandi umboð, tað verið seg politikarar, embætisfólk, granskarar og vinnulívsfólk úr øllum heiminum, hava sett hvørjum øðrum stevnu í íslendska høvuðsstaðnum til árligu arktisku ráðstevnuna “Arctic Circle”, lat eisini russiska sendistovan í býnum dyrnar upp. Stór móttøka var fyri innbodnum. Og millum innbodnu gestirnar vóru fleiri umboð úr Føroyum,

teirra millum Aksel Johannesen, løgmaður, Joannes V. Hansen, fulltrúi í Tinganesi, Petur Petersen, føroyski sendiharrin í Íslandi, Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður, Hákun Djurhuus, SEV-stjóri, Suni Lauritsen, nevndarformaður í SEV umframt onnur umboð úr Føroyum.

Ein fryntligur og jaligur russiskur sendiharri, Anton V. Vasiliev, tók ímóti og nýtti hann høvi til at ynskja nýggja føroyska løgmanninum tillukku við valinum. Um viðurskiftini millum Russland og Føroyar eisini vóru á breddanum hesa løtuna í Reykjavík fæst ikki at vita. Men hýrurin var góður.

Aksel Johannesen hevði eisini høvi til at hitta ein hin kendasta russiska vísindamannin, tá tað um Arktis ræður, nevniliga Artur Chilingarov, sum gjørdist heimskendur, tá hann vegna Russland og Putin forseta, setti russiska flaggið á havbotnin á Norðpólinum. Við til móttøkuna var eisini Føroyavinurin og umhvørvisstríðsmaðurin, Orry Vigfusson, ið hevur brúkt stóran part av sínum lívi at verja laksastovnarnar í Norðuratlantshavi.

Arktiska ráðstevnan, sum byrjaði hósdagin, endar í dag. Løgmaður, sum hevur verið rættiliga sjónligur her í Hørpuni, fór heimaftur í morgun. Áhugin millum føroyskar politikarar fyri ráðstevnuni má sigast at hava verið rættiliga stórur. Umframt løgtingslimir í Útnorðurráðnum og føroyska fólkatingsmannin hjá Javnaðarflokkinum, hevur eisini hin føroyski fólkatingsmaðurin, Magni Arge frá Tjóðveldi nýtt høvi til at vitja ráðstevnuna.

























